

## Kunning í samband við skúlafótbóltin 10. apríl 2019 í Vági hjá 1. flokki

So er tíðin komin til, at vit í 1. flokki á skúlanum við Løgmannabreyt fara til skúlafótbólt í Vági. Vit hava eisini atgongd til lítla klatriveggin í Marghøllini og sleppa at svimja í Pálshøll.

Hesin túrur verður eisini tann árligi flokstúrurin, sum vanliga verður skipaður, sum er uttanfyri Havnina.

Mikudagin tann **10. apríl 2019** fara vit saman við nøkrum foreldrum til Vágs til skúlafótbólt. Skúlin betalir fyri ferðakostnaðin hjá foreldrunum, tó ikki um tey hava egnan bil við.

Vit **møta** á Farstøðini í seinasta lagi **kl. 8.20**. Smyril siglir kl. 8.45. Tá vit koma á Drelnes standa bussar fyri okkum, sum koyra okkum til Vágs. Tað er eisini skipað fyri bussflutningi frá Vági til Drelnes. Eru tað foreldur, sum kundi hugsað sær at havt bil við, so eru tey vælkomin til tað.

Dagurin verður langur, tí er tað umráðandi, at øll hava etið ein góða morgunmat, áðrenn fráferð. Harumframt skulu tey hava ein góðan og stóran **matpakka** við, umframt ein vatndunk. Tey eru vælkomin at hava lummapengar við, tó í mesta lagi kr. 100. Tey umsita sjálvi peningin.

Best er, um børnini ferðast í ítróttarklæðum. Tað kann vera sera kalt í Marghøllini, tí skulu børnini verða í heitum klæðum/hava heit **klæðir** við. Børnini skulu eisini hava skiftiklæðir, svimjiklæðir, handklæði og armringar, um tey ikki duga at svimja sjálvi, við. Vit vilja mæla tykkum til at leggja skiftiklæðini/svimjiklæðir í plastposar, so alt ikki verður vátt og skitið.

Alt hjá barninum skal verða í einari tasku, sum tað sjálvt megnar at bera. Minnist til at seta navn á taskuna, so tað er lættari hjá okkum at halda skil á taskunum.

Eftir ferðaætlanini so er Smyrli væntandi **aftur í Havn** kl. 20.45.

Av tí vit koma so seint til Havnar, og næmingarnir hava havt ein langan dag, so byrjar **skúlagongdin hósdagin** 11/4 kl. 9.50. Um tað er onkur, sum hevur tørv á, at barnið møtir fyrr, so vinarliga sigi frá.

Um tað er onkur, sum veit, at tað **ikki liggur fyri at koma** við nevnda dagin, vilja vit fegin fáa tað at vita, tí tað kann vera avgerðandi fyri, hvussu liðini verða skipaði.

Vit gleða okkum at fara ein øðrvísi túr við tykkara børnum.

Vinarliga

Toymið í 1. flokki